# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Halda veljaran fyri gjøldur

Í blaðnum í gjár kundu vit avdúka, at ein meiriluti á tingi vil, at Føroyar aftur skulu skipast í fleiri valdømi. Líka síðani løgtingið varð endurreist í 1852 hevur landið verið býtt í sjey valdømi. Fyrstu tíðina varð val ikki hildið í øllum valdømunum samstundis, men val varð hildið upp á skift sunnanfjørðs og norðanfjørðs við tveimum árum ímillum. Men síðani løgtingsvalið 10. november í 1920 hevur verið valt allastaðni samstundis – og til og við valið 20. januar í 2004 í sjey valdømum.

Tað var fyri tveimum árum síðani, at Edmund Joensen, táverandi løgtingsformaður, legði fram uppskot um at broyta valskipanina soleiðis, at landið skuldi gerast eitt valdømi.

Fleiri tóku undir við hesum – eisini vit á hesum stað. Grundgevingarnar vóru, at sleppast kundi undan avlagandi lokalpolitikki – og so varð sagt, at hetta eisini fór at fremja betri javnstøðu millum kynini á tingi. Hóast meiriluti var á tingi – og kanska millum fólk við – fyri at broyta valskipanina, so vóru tað fleiri serfrøðingar, sum mæltu frá.

Nú er so uppskot um at endurskoða valskipanina komið í ljósmála. Fleiri av teimum tingfólkum, sum atkvøddu fyri at gera Føroyar til eitt valdømi, vilja nú aftur býta landið sundur í fleiri valdømi. Hetta tykist sum politiskt arbeiði av handahógvi merkt – og bendir á, at løgtingið ikki gjørdi sítt fyrireikingararbeiðið til lýtar – ella kanska at tingfólk taka onnur atlit, eitt nú hvussu tey sjálvi kunnu veljast aftur.

Tað skerst ikki burt, at tað er ein kollvelting hjá politisku skipanini, sum helst varð skrumblað ígjøgnum í 2007. Hetta átti at verið fyrireikað betur, so at bæði løgtingið, tingfólk, politisku flokkarnir og politisku valfeløgini – eins og vanligi veljarin, betur fingu umhugsað seg og fyrihildið seg til nýggju støðuna.

Um løgtingið nú – eins og løgtingsformaðurin boðar frá í blaðnum í dag – kanska aftur fer at broyta valskipanina til ta gomlu, tað er at halda veljaran fyri gjøldur.

**Sosialurin**

## Sjálvsprísandi nationalromantiskt frælsishugtak endar í stórlætisørskapi

JOHAN PETERSEN



Soleiðis kann ein uppgerð hjá íslendskum bókmentagranskara í stuttum samanfatast. Minnir útsøgnin ikki nógv um okkara egna veruleika? Er tað neyðugt hjá okkum eisini at avprøva, hvat hetta endar við?

Í Sosialinum í vikuni, sum fór, var samrøða við íslendska bókmentagranskaran Kristján Jóhann Jónsson, sum ger upp við íslendska undrið og eftirfylgjandi kollapsi.

Hann vísir á, hvussu Ísland, mótsatt flestu europeisku londunum, helt fast við eina ofta sjálvsprísandi nationalromantiska frælsishugsjón, sum gav íslendingum eina fatan av, at vera eitt sterkt og frælst fólk. Teir vóru ofta sannførdir um, at teir vóru heimsins bestu í næstan øllum, ja, enntá so framúrskarandi, at Ísland gjørdist ov lítið og mestsum ein forðing fyri teirra stórleika.

**Europa slepti nationalromantikkinum**

Hinvegin sleptu flestu europeisku londini hesi hugsan tíðliga í 1800-talinum til fordeil fyri liberalistisku frælsishugsjónini um ábyrgd og frælsi hjá tí einstaka menniskjanum.

Øll vita vit, hvussu syrgiliga nationalromantiska frælsishugtakið, ella misskilta nationalisman, sum vit kalla hetta fyribrigdið, endaði fyri íslendingar.

**Avgrund fyri framman**

Eisini í Førjum hevur hetta nationalromantiska frælsishugtakið fastatøkur á okkum føringum. Allir flokkar uttan Sambandsflokkurin lata seg tøla av hesi kenslubornu hugsjón uttan at síggja avgrundina, sum er fyri framman.

Stórlætisørskapurin hevur longu innheintað okkum: í nationalromantiskum rúsi hava vit skert blokkin og yvirtikið hópin av málsøkjum, sum onki fungerar, sum tað skal. Hesin ørskapur gongur fyrst og fremst út yvir tey veiku, tey sjúku og tey gomlu, men hvat ger tað, tí í *hjørtum okkara býr frælsi*!

**Liberalistisk frælsishugsjón**

Hinvegin hellir Sambandsflokkurin mest til ta liberalistisku frælsishugsjónina, sum gevur einstaka menniskjanum størst møguligt frælsi og møguleikar undir ábyrgd. Og fyri at skapa røttu og neyðugu karmarnar fyri, at einstaklingurin kann gagnnýta hesar møguleikar saman við sínum evnum og talentum, gongur Sambandsflokkurin sum tann einasti føriski flokkurin inn fyri í ríkisfelagsskapi at menna førisku tjóðina.

**Menning innan felagsskap**

Og fyri at vinna uppaftur longur fram á leið, gongur Sambandsflokkurin eisini inn fyri at kanna limaskapstreytir í ES, so vit møguliga í einum uppaftur størri felagsskapi kunnu menna land okkara enn meir og betri.

Brøðratjóð okkara Ísland hevur merkt sviðan av nationalromantisku frælsishugsjónini. Er tað so neyðugt, at vit eisini skulu avprøva, um tað veruliga er rætt, tað íslendingum hevur verið fyri? Eiga vit ikki at vísa teimum ta virðing, at teirra lagna ikki var til fánýtis, og at vit tí ikki gera sama mistak?

## X-Factor sangari í Frelsunarherinum

Í samband við at Frelsunarherurin í Tórshavn fyllir 85 ár, skipa tey fyri »sangcafé« í Freslunarherinum í Tórshavn fríggjakvøldið 23 oktober klokkan 23.

Á skránni verður Lovsangur, vitnisburður, Sigurður Ingimarsson (Siggi v/bólki) syngur, og okkurt gott til matna verður eisini at fáa.

Sigurður Ingimarsson er, saman við føroyski konu hansara Rannvá Olsen úr Tórshavn, leiðari í Frelsunarherinum í Reykjavík.

Sum tónleikari og sangari er Sigurður, við eyðkendu rokk/bluesrøddini, framúrskarandi. Hann hevur ferðast á tónleikapallum í Íslandi og hevur spælt saman við bestu tónleikarum í Íslandi.

Í 2007 luttók hann, saman við eitt nú Jógvani Hansen úr Klaksvík í íslendsku tónleikakappingini X-factor. Hetta var tað árið, Jógvan Hansen vann kappingina.

Gjøgnum X-factor er Sigurður blivin landskendur í Íslandi, og tað sum hevur gjørt hann so sermerktan er, at sjálvt um hann er blivin landskendur, so er Sigurður ógvuliga greiður yvir sín egna málsetning, sum er at siga fólki frá og syngja um Jesus.

- Kom og ver við til eitt ógloymandi kvøld í Frelsunarherinum í Tórshavn, sigur Frensunarherurin í tíðindaskrivi.



### Brúðarkjólin er óbrúktur

Brúðarkjólin, sum var vístur á mótasýningini á Lívsstílsstevnuni er frá Sonja design, og ikki ein brúktur, sum vit skrivaðu í blaðnum ígjár.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13$^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.